# Lagnufelagsskapurin mill



*Føroyska ferðalagið við gravsteinin hjá manningini á "Onnu" í kirkjugarðinum í Reykjavík*

**Vit prenta í dag framløguna, sum Óli Jacobsen hevði á rástevnuni um møguleikarnar við Hoyvíkssáttmálanaum, sum var á Sjómansheiminum Ørkini í Reykjavík 9. – 12. mars**

*Óli Jacobsen*

Eg vil fegin takka fyri møguleikan at siga nøkur orð her í dag. Tað, sum eg vil greiða eitt sindur frá, er lagnufelagsskapurin millum Føroyar og Ísland, sum má sigast at vera einastandandi millum hesi bæði londini.

Sum tey flestu vita, byrjaði okkara skipsfiskiskapur við sluppum í 1872. Tey fyrstu árini varð veitt undir Føroyum við misjøvnum úrsliti. Men so vendust eyguni til Íslands, har fiskigrunnarnir vóru bæði størri og ríkari til fisk. Hetta førdi til, at Ísland gjørdist okkara fremsta veiðuleið í mong áratíggir.

### 3500 føroyskir fiskimenn undir Íslandi

Longu fyrst í 20. øld er Ísland ein munandi partur av okkara fiskivinnu. Í 1901 vóru 83 føroysk skip undir Íslandi, og við hesum skipum vóru tilsamans 1.122 mans. Hæddin á hesi veiðu var í 30-unum. Í 1934 vóru ikki færri enn 155 skip við 3.500 monnum undir Íslandi. Tað er lætt at rokna út, at hetta hevur verið ein heilt stórur partur av arbeiðsføra mannfólkinum, sum var í Føroyum. Tað hava verið fá hús og enn færri familjur, sum ikki hava havt onkran av sínum á hesum leiðum. Um hesa tíðina kom Grønland inn í myndina, men tað er ein onnur søga.

Umframt tað arbeiði, sum hetta gav fiskimonnum sjálvum, gav fiskurin heilt nógv arbeiði til heimafólki og serliga til konufólkið við fiskaarbeiði og fiskaturking.

Okkara viðurskifti við Ísland komu so at broytast, og í 50-unum stakk ein heilt nýggj støða seg upp. Tá høvdu íslendingar nógv skip og fáar fiskimenn, meðan tað var øvugt í Føroyum við einum vánaligum flota og nógvum fiskimonnum. Hetta merkti, at ein hópur av fiskimonnum fóru til Íslands at manna íslendsku skipini, eins og tað fóru nógv fólk, ikki minst konufólk, at arbeiða á landi. Tað hava verið nevnd tøl sum 1500 fiskimenn sum vóru í Íslandi, tá tað var mest og hevði hetta eisini alstóran týdning fyri okkara land.

Sum frá leið varð okkara egni fiskifloti endurnýggjaður, og okkara fiskimenn komu heim aftur. Seinastu árini eru umstøðurnar broyttar í báðum londum á hesum økinum, men tað skerst ikki burtur at Ísland hevur havt ein sera avgerandi týdning fyri føroyska samfelagið, og fyri Ísland hevur hetta eisini havt sín týdning. Hetta merkist eisini við teirri vælvild, sum føroyingar merkja í Íslandi tann dag í dag og vil eg siga øvugt eisini.

### Fiskimannagravirnar í Reykjavík

Okkara veiða undir Íslandi hevur merkt nógv meira enn hetta. Sum aðrir føroyingar havi eg sjálvtsagt altíð vitað um tey skip, sum eru gingin burtur undir Íslandi við øllum teimum hundraðtals mannalívum, sum hetta hevur kostað. Men hvussu stóran týdning hetta hevur havt fyri okkara samleika ella identitet gekk ikki rættuliga upp fyri mær fyrr enn í 1999, og hevur hetta eisini samband við júst Ørkina, har vit eru stødd í dag.

Tá var nevndin í Fiskimannafelagnum á kunningarferð í Íslandi, har vit vitjaðu okkara systirfelag Sjómannasamband Íslands, sum vit í mong ár hava havt sera gott samskifti við. Her vil eg nýta høvið til at nevnda formannin gjøgnum nógv ár, mín góða vin Óskar Vigfusson, sum doyði fyri einum ári síðani, og sum var ein lyklapersónur í samstarvinum millum londini bæði.

Á hesi ferð var tað ein partur av skránni at leggja krans á føroysku fiskimannagravirnar í kirkjugarðinum í Reykjavík, har menninir av "Onnu" og "Acorn" liggja grivnir.

Søgan um "Acorn" er kend av teimum flestu, men "Onnu" visti eg einki um og fór at kanna hana. Hetta var slupp av Toftum, sum í 1924 á veg inn til Grindavík við einum sjúkum manni sigldi á eitt sker, og øll manningin 17 umkomst. 14 av teimum eru jarðaðir í Reykjavík.

Í 1999 vóru tað júst 75 ár liðin síðan hesa vanlukku, og eg segði onkrum av teimum um avvarðandi frá okkara ætlan um hesa kranslegging.

Tað gingu bert nakrir tímar, tá var flogfarið til